

# Almannastovan søkir leiðara til Vitanardeildina.

Á Almannastovuni virka vit miðvíst fyri at lúka krøvini frá politiska myndugleikanum og viðskiftafólkunum. Dentur verður lagdur á høgt tænastustøði, rættartrygdina og virðingina fyri einstaklinginum, eins og virkað verður fyri áhaldandi at menna førleikan, trivnaðin og samstarvið á stovninum.

Vit søkja eftir leiðara til nýstovnaðu Vitanardeildina á Almannastovni til setan skjótast gjørligt. Á deildini koma at starvast trý fólk og leiðarin hevur beinleiðis tilvísing til stjóran. Starvsøkið hjá Vitanardeildini er at menna grundarlag fyri skipaðari vitanardeiling, at menna prosessir innan KT, integratión av KT og virkisgongdum, at umsita og menna KT-økið og at effektivisera mannagongdir í tøttum samstarvi við stáps- og rakstrardeildirnar á Almannastovuni.

KREA.FO · TEL 44 93 39

Vitanarleiðarin verður partur av einum stovni, ið alla tíðina má tillaga seg broytingunum í samfelagnum og taka við avbjóðingunum, sum liggja í tíðini og í framtíðini.

Okkara ynski er at vitanarleiðarin er virkisfúsur og eltir uppgávurnar frá byrjan til enda, hevur góð samstarvsevni og er sinnaður at menna seg bæði fakliga og persónliga.

Vit sóknast eftir einum fólki, sum hevur viðkomandi prógv frá hægri lærustovni, so sum polit, oecon, cand. merc. ella aðra hóskandi útbúgving. Einum fólki, sum hevur leiðsluroyndir og royndir innan økið, hevur góðan førleika innan KT og hevur evni til at raðfesta og tilrættisleggja arbeiðið.

**Starvið umfatar í høvuðsheitum**

- at ráðgeva og vegleiða leiðsluni í KT-viðurskiftum
- at KT verður gagnnýtt við atliti til m.a. at effektivisera mannagongdir á stovninum
- ábyrgdina av at skipa leiðsluhagtøl og almenn hagtøl, umframt greinignarverkætlanir
- ábyrgdina av KT-trygdini á Almannastovuni
- ábyrgdina av og víðari menning av kjarnuskipanini á stovninum
- at leiða verkætlanir, eisini tvørfakligar
- at skipa mannagongdir á KT-økinum og
- aðrar ad hoc uppgávur

Starvið verður sett og lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Petru Johnsdóttir Joensen, stjóra, á telefon 35 35 10.

Skrivlig umsókn skal vera Almannastovuni í hendi í seinasta lagi 20. juni 2005 kl. 12.

Send umsóknina til:
Almannastovuna,
Smyrilsvegur 20,
Postboks 3096,
110 Tórshavn.

almannastovan
almannastovan@almannastovan.fo
www.almannastovan.fo

# Starvsfólk

## TIL SUNSET BOULEVARD Í SMS

### Hálva tíð

Søkt verður fólki M/K í aldrinum 16-25 ár, at arbeiða hálva tíð - um dagin, kvøldið og í vikuskiftunum - at byrja skjótast tilber. Ert tú opin, virkin, røkin og dámar væl at arbeiða við fólkum, so er hetta júst nakað fyri teg.

Tú gerst partur av einum vælleikandi liði við nógvum starvsfólkum í einum nógv vitjaðum umhvørvi.

Vit læra teg á staðnum...

### Fulla tíð

Søkt verður fólki M/K í aldrinum 16-25 ár, til fulltíðarstarv - at byrja skjótast tilber. Ert tú opin, virkin, røkin og dámar væl at arbeiða, har tað veruliga hendir nakað, so er hetta tað. Tað ger onki, um tú hevur hóskandi royndir. Vit seta teg inn í okkara arbeiðsmannagongdir og eftir hetta gerst tú eitt av álitisstarvsfólkum okkara.

Vit gleða okkum at hoyra frá tær...

Send umsóknina til:
Sunset Boulevard, SMS, Postboks 1059, 110 Tórshavn,
ella far inn á www.sms.fo og útfyll eitt umsóknarskjal.

SUNSET Boulevard

# OUTSIDER MAGAZIN

## OUTSIDER MAGAZIN ER ĒTKOMIħ!

ViĨ ² blaĨnum eru greinar, ummÞli, essays, nĨggjar fßroyskar sßgur v.m. BlaĨiĨ, sum er 176 s²Ĩur, kann keypast ² b·khandlum og st·rum kioskum ² Fßroyum og kostar 165 kr.

OUTSIDER MAGAZIN kann eisini b²leggjast § nĨggju heimas²Ĩuni www.outsidermagazin.com

Tey, sum vilja halda blaĨiĨ, kunnu senda mail til outsidermagazin@gmail.com ella br¼ka lepan niĨanfyri. Gjßrligt er eisini at seta 165 kr. (+ 35 kr. fyri postgjald) § konto 9181 1447957 ² Fßroya Sparikassa ð minnist til at viĨmerkja tygara b¼staĨ!




NAVN: ____________________

BĒSTAħUR: ____________________

POSTNR. & BĨUR/BYGD: ____________________

LAND: ____________________

Lepin skal sendast til:
OUTSIDER MAGAZIN - Haldarar
v/ Svend Hßjgaard Å Rektorparken 22, 4. tv Å DK - 2450 Kßbenhavn SV

Hßgni Egholm Magnussen - illugraphique.com